# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Skopuningur ársins leikari í Tromsø?

Jóna Nicolajsen, sum í mong ár hevur virkað bæði sum venjari og leikari í B71, býr nú í Tromsø í Norra. Fótbóltin hevur hon tó ikki gloymt, tí hon er í uppskoti til ársins kvinnuliga leikara í Tromsø umráðnum; Troms Footballkrets.

Á heimasíðuni hjá Tromsø økissambandi stendur, at higartil eru 25 fólk í uppskoti til ársins leikarar, dómarar og venjarar. Sagt verður, at til ber at atkvøða oktober mánað út. Síðani skal ein nevnd gera av, hvørji fáa heitini.

Tey, sum kundu hugsað sær at atkvøtt fyri Jónu, kunnu senda ein teldupost til: troms.football@football.no. Sí nærri inni á heimasíðuni; http://www.fotball.no/troms/t1.asp?p=53496&x=1&a=178371



*Jóna Nicolajsen er í uppskoti til ársins kvinnuliga leikara í Tromsø umráðnum í Norra*

Hendir tað, at Jóna gerst ársins leikari í Tromsø, verður hon fyrsti B71-ari, ið fær henda heiður uttan fyri landoddarnar.

## Jakku hjá Simonu 75 ár

Í dag, mikudagin 25. oktober, verður Joen Jacob Hansen í Klaksvík 75 ár. Hann er ættaður av Vágsheygnum. Foreldrini vóru Simona, sum var ættað úr Gerðum, og Hanus Hansen, sum var ættaður úr Glasstovuni í Árnafirði. Tey búsettust á Vágsheygnum og fingu níggju børn: Oliva (1915), Anna Kristina (1916), Jóhanna Malena (1919), Berta (1921), Olga (1923), Erik (1924), Kristoffur (1927), Joen Jacob (1931) og Marita (1940). Oliva, Berta, Olga, Erik, Kristoffur og Jakku búsettust í Klaksvík. Anna Kristina búsettist í USA, Johanna Malena í Vestmanna og Marita í Svøríki.

Jakku fór ungur til skips. Hann sigldi við norðmonnum, við skipum hjá Kjølbro, har hann í fleiri ár var við Skálabergi, og í seksti árunum við línuskipunum hjá Innistovu monnunum.



Jakku er hegnismaður. Í 1968 fór hann rættuliga tilkomin í læru sum tannteknikari í tannlæknastovuni hjá svágrinum Fróða Lassan. Hann hevur fingist við tannteknikaraarbeiði seinastu knappliga fjøruti árini. Áhugan fyri sjólívinum hevur Jakku ongantíð mist, og honum hevur dámað væl at verið á floti.

Jakku er fryntligur og fyrikomandi maður. Hann giftist í 1957 við Rannvá Lassen. Hon er ættað úr Víkunum. Foreldur hennara vóru Jóhanna Sofia og Erik Lassen. Rannvá og Jakku bygdu í Gerðum. Snøggu og hugnaligu húsini, sum Jakku so ofta sæst putlast uttanfyri, standa á horninum Oyravegur/Kráargøta.

Rannvá og Jakku eiga tvey børn – Símun Jákup (1960) býr í høvuðsstaðnum, og Eyðfríð (1963) býr niðri. Abbabørnini eru seks í tali.

Jakku vaks upp á Vágsheygnum í nánd av plenuni. Allir dreingir har á leið royndu seg sum fótbóltsspælarar. Jakku var ein teirra, sum hevði góð evni at spæla bólt, og hóast hann var ungur, tá ið hann fór til skips, so eydnaðist honum at vera við til at vinna fleiri føroyameistaraheiti. Í 1947 var hann á dreingjaliðnum, sum varð meistari, og hann var við á 1. liði, sum varð meistari í 1952, 1953 og 1954.

J

## Holy Riders MC Føroyar skipa fyri MC-tiltaki

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 27. okotobur kl. 17.00 byrjar eitt MC-tiltak uppi í Miðlon við Hoyvíksvegin. Tað er MC-felagið Holy Riders, ið skipa fyri ymsum til undirhalds og framsýningar.

HOLY RIDERS MC

**Sangluttøkur**

Tríggjar sangløtur verða á pallinum í erva, har Theodor Petersen syngur fríggjadagin kl. 18.00. Leygardagin 28. oktobur kl. 11.00 syngja systrarnar Vanja. Laila og Barbara og kl. 14.00 syngur Lisa Frederiksberg.

**Framsýningar o.a.**

Við høvuðsinngongdina er framsýning av ymsum motorsúkklum. Eisini verður borð dekkað við Biker-Bíblium og øðrum bíbliuútgávum frá felagsskapinum "Bible for the nations". Í hesum døgum verða lutaseðlar seldir til fram fyri felagið Holy Riders og sum stuðul til nýggjar útgávur av Biker-Bíblium, og so hevur Holy Riders eisini eitt blandað úrval av reklamulutum, sum verða seldir sum stuðul til felagið. Lisa Frederiksberg selur eisini sína nýggju fløguútgávu og signerar, um ynskist.

**Harley Davidson Føroyar sýnir fram**

Sum eitt eyka tiltak, verður Harley Davidson Føroyar eisini við í tiltakinum, og sýna teir fram nýgjastu 2007 útgávurnar av HD-súkklum, umframt blandað úrval av vørum frá handilssamtakinum "4 Bikers", har m.a. nógv góð leðurklæðir fáast, umframt ymsa trygdarútgerð til motorsúkklur.

Øll eru hjartaliga vælkomin til tiltakið.

## Jóna Rasmussen í Focus

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 27. oktober kl. 16 til 18 letur ein framsýning við málningum og grafikki hjá Jónu Rasmussen upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Vit kenna Jónu Rasmussen mest frá tí grafisku síðuni – hendan framsýningin er meira merkt av litum. Framsýningin fevnir um eina tíð, har Jóna Rasmussen hevur arbeitt við málningum, nakað av grafikki er tó eisini við á framsýningini. Dóttir Jónu, Sigrið Rasmusen, kemur at syngja undir ferniseringini saman við gestatónleikara.

Framsýningin verður opin til 9. november, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.



*Í døgunum frá 27. oktober til 9. november hevur Jóna Rasmussen, listakvinna, framsýning í Galerie Focus*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Lesið Sosialin - so eru tit við